


# Kanna Drekaleiðina í summar

Jan Müller

28.05.2014 - 22:00

Oljan.fo

Eykon Energy og hini feløgini í samstarvinum fara í summar at gera nakrar kanningar á Drekaleiðini, sum er millum Ísland og Jan Mayen.

-Vit hava tilfar, sum er savnað tey seinastu 33 árinmi, og í summar ætla vit at fáa fatur á tí, sum restar í, fyri at vit kunnu gera okkum eina heildarmynd av viðurskiftunum, sigur Heiðar Már Guðjónsson, nevndarformaður í Eykon Energy, við Morgunblaðið.

Felagið hevur gjørt av at brúka havnina á Reyðarfirði sum útgerðarhavn í sambandi við kanningarnar á Drekaleiðini í summar og í sambandi við møguliga oljuvinnu har seinni.